# BØNARLØTAN

JANUAR 2022 37. árg.

## GOTT NÝGGJÁR!

*Verið tí árvakin og edrú til bønir!*

*1. Pæt. 4.7*

## *1. Nýggjársdagur* *1.Mós. 1.1-19*



*Aqqu Bendtzen eftir at hava hjálpt til at fáa Juveleeraq upp á land í heyst.*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Vit hava kent Aqqu Bendtzen í 12 ár. Hann er 60 ár og kom til trúgv sum smádrongur. Hann hevur eyguni eftir bátunum, er sera ábyrgdarfullur og er mangan til stóra hjálp. Seinnu árini hevur hann verið merktur av fleiri álvarsomum sjúkueyðkennum. Biðið fyri honum og familju hansara.

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)**
Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Sunnudagur* — *Mark. 1.1-20*





**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Susan og Øssur Berghamar**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas12, Kristina 10**

Vit ynskja øllum vinum og kenningum eitt signað 2022 og takka fyri samfelag, forbøn og stuðul. Aftur leggur korona sína køvandi hond yvir Danmark. Okkum tørvar náði, vísdóm og leiðslu Harrans í sambandi við støðuna og nýggja árið.

## *3. Mánadagur* — *1. Mós. 1.20-31*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah Ève 8, Abigail 3**

Frá feb. hevur arbeiðsplássið játtað Jóhannisi ein frídag um vikuna til tænastuna. Í juli verður hetta væntandi hækkað til tveir dagar um vikuna. Gud hevur signað stórliga síðstu vikurnar. Biðið fyri arbeiðnum at stovna samkomu, arbeiðnum millum ung og flóttafólk.

## *4. Týsdagur* *Mark. 1.21-45*

**ZAREPTA**
Biðið, at legur kunnu haldast í hesum árinum í tryggum umstøðum.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 12, Ester 11, Samuel 7**

## *5. Mikudagur* *1. Mós. 2.1-25*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Vit prísa Harranum fyri øll tey, sum komu til konsertirnar og møtini á jólum. Nógv hoyrdu góðu tíðindini um Jesus, sum doyði á krossinum fyri tey, og fleiri komu til trúgv.



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Hósdagur* *Sálm. 1 og 2*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Arbeiðið at endurskoða Ápostlasøguna verður helst liðugt tíðliga í 2022. Eitt týdningarmikið stig á leiðini at gera Skriftina klára til útgávu er at lesa hana saman við fólki, sum ikki hava hjálpt at umseta. Farsóttin hevur forðað fyri at vitja fólk. Biðið, at vit í ár kunnu vitja bygdirnar fyri at kanna umsetingina.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15, Emma Grace 14,**
**Jónatan 12, Markus 9, Evita 6, Joy 5**

Biðið fyri teimum umleið 40, sum vóru við til árliga evangeliska jólatiltakið á leguni, m.a. grannar okkara og familja hjá fólki í samkomuni. Bussurin gjørdi eykatúr við trimum familjum. Guicho, sum nú hevur livað fimm ár við Harranum, kom til trúgv, tá hann var við til hetta tiltakið á jólum.

## *7. Fríggjadagur* *Mark. 2.1-28*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**

Biðið fyri fimm ungum sorimimonnum, sum hava tikið ábyrgd at virka í samkomuni, at Harrin signar teir í arbeiðnum. Eg havi nógv tilfar at arbeiða við eftir vitjanina í Sorimi. Biðið fyri næmingunum hjá NTM North Cotes, sum teir halda áfram við útbúgvingini.

## *8. Leygardagur* *1. Mós. 3.1-24*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 14**
Vit fyrireika fýra ymisk STEVN tiltøk. Eisini gera vit 100-120 videoupptøkur, og nógv orka verður framhaldandi løgd í at gera heimasíðuna. Biðið um Harrans vegleiðing og varðveitslu.

**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**



Biðið, at vit fáa nóg nógv hjálparfólk í nýggja árinum, fyri einleika í toyminum og fyri børnunum, at tey vaksa andaliga. Vit takka eisini fyri stuðul og forbøn, nú vit eru gift.

**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**
★ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 18 ár

## *9. Sunnudagur* *Mark. 3.1-19*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**
Eftir eina tíð við størri frælsi, væl vitjaðum møtum, aktivitetum og felagsmáltíðum, noyðast vit aftur at venja okkum við avmarkað samfelag vegna koronu. Biðið, at vit megna at røkka út til menniskju og vísa umsorgan, og fyri dóttur okkara Hannah, sum enn er umborð á Logos Hope.

## *10. Mánadagur* *1. Mós. 4.1-26*

### INDONESIA
**Krissy og Daniel Hansen, Zephaniah 2**

Takk fyri góða vitjan í Føroyum og fyri høvi at greiða frá virkseminum. Minnist okkum, nú vit fyrireika okkum at flyta til Indonesia sum trúboðarar. Biðið, at tilgongdin við innfarar- og uppihaldsloyvi skal ganga skjótt og væl. Daniel er sonur Rachel og Peter Hansen.

### NTM - FØROYAR
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 11, Tabita 8, Debora 6, Natan 3**

⋆ Í dag fyllir Joy Tuohy 5 ár

## *11. Týsdagur* *Mark. 3.20-35*



### DANMARK, Kolding
**Anne og Jan Zachariassen**

Fundurin í USA hálvan jan. um bíbliuumseting fyri deyv verður í staðin á Zoom orsakað av koronu. Takk fyri, at tit minnast okkum í bøn.

### DANMARK
**Glostrup Frikirke**

Bøn okkara fyri samkomuni er: Latið okkum geva gætur hvør eftir øðrum, so vit fáa hvør annan at brenna í kærleika og góðum verkum – og ikki geva uppat at koma saman hvør við annan. *Hebr. 10.24-25*.

## *12. Mikudagur* — *1. Mós. 5.1-32*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 8, Micah 8**

Solomon verður einsamallur elsti í samkomuni næstu seks mánaðirnar, so øll leiðsla liggur á honum hesa tíðina. Biðið um vísdóm, og at Harrin leiðir hjálparfólk til okkara.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**



## *13. Hósdagur* — *Sálm. 3 og 4*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Í mars 2021 keyptu vit nýggjan bygning tætt við samkomuna. Tí er møguligt at byggja størri á økinum til víðkaða tænastu. *Sálm. 127.1*

## *14. Fríggjadagur* *Esaias 1.1-20*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

Ætlanin er at fara aftur til Grønlands um 20. mai. Biðið, at Harrin leiðir, og at mong vilja verða við til at manna skipið.

**– Anna og Óli Steinberg**

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Leygardagur* *Róm. 1.1-15*



**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**

Vit eru Harranum takksom fyri trúfesti og signingar hansara í farna ári og takka fyri forbøn. Við ynski um Harrans ríku signing í hesum nýggja ári, gleðast vit um lyftið í Matt. 28.20 *Og Eg eri við tykkum allar dagar, líka til enda tíðarinnar.*

**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**

## *16. Sunnudagur* *Esaias 1.21-31*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
**Atlantic Mission, Juvel II**

Um koronustøðan loyvir tí, er ætlanin at gera evangeliska ferð til Hetlands í apríl-mai 2022 – eisini fyri at stimbra systrar og brøður í trúnni.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 8**

⋆ Í dag fyllir Hadassa Christiansen 11 ár

## *17. Mánadagur* *Róm. 1.16-32*



**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Takk fyri forbønir og stuðul í farna ári. Ivor og leiðslutoymið í samkomuni brúka nógva orku at fáa fólk at koma aftur í samkomuna eftir Covid 19-avmarkingarnar. Guðrun heldur fram at ansa mammu Ivor. Tað gongur væl hjá børnunum.

## *18. Týsdagur* *Esaias 2.1-22*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 9, Emma 5**

Vit eru takksom fyri, at Sólvá B. Ziska og Oda Drós Østerø vóru og hjálptu til í arbeiðnum her. Serliga hjálptu tær til við barnaarbeiðnum, ungdómsarbeiðnum, jólatiltøkum og annars við vælgerandi arbeiði út frá samkomuni.

## *19. Mikudagur* *Róm. 2.1-16*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Biðið um vísdóm í fyrireikingum til leiðarafundir í feb. Biðið, at synirnir Karl og Caleb aftur skulu njóta sambandið við Gud.



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru komin aftur til Turkalands eftir langan steðg í Onglandi orsakað av koronustøðuni. Tænastan umfatar bíbliubrævaskeiðið, bønarhúsið og annað, sum Harrin leiðir til. Biðið fyri okkum, nú vit aftur fara at søkja um uppihaldsloyvi hesar komandi vikurnar.

## *20. Hósdagur* *Sálm. 5 og 6*



**Elam Ministries, Evropa**
**Margretha Højgaard Poulsen**

Evropatoymið hjá Elam eggjar iranum og afghanum í Evropa til lokala tænastu. Seinastu tvey árini hava korona og brexit ávirkað alla ferðing, men virksemið online er nógv styrkt. Nú ferðast vit so smátt aftur. Biðið, at visumtrupulleikar ikki forða alt ov nógv.



**TÝSKLAND**
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

## 21. Fríggjadagur — Esaias 3.1-26



### PAPUA NÝGUINEA, Kovol
### Natalie og Philip Hansen
### Louis 4, Timon 2

Vit hava fingið meiri heilivág fyri malaria til kovolfólkið, og mýggjabitanet verða eisini býtt út. Ein serlig avbjóðing við kovolmálinum nú er at finna hóskandi stavrað til málið.

## 22. Leygardagur — Róm. 2.17-29



### ONGLAND, Taunton
### Dorit og Simon Marshall

Vit takka Harranum fyri trúfesti; hann hevur hjálpt við heilsuni og nøktað okkara fíggjarliga tørv. Nógvar ætlanir brustu í fjør, men í heyst vórðu ferðaseðlar keyptir at fara til Kekkia í feb., og til Simon at fara til Brasil í mars. Biðið, at ferðirnar kunnu fremjast uttan forðingar.

## 23. Sunnudagur — Esaias 4.1-5.10



### FILIPSOYGGJAR
### Puerto Prinsessa
### Cathy og Jógvan J. Rasmussen

Biðið, at vit skjótt sleppa aftur til Filipsoyggjar, har nógv arbeiði liggur og bíðar.

## *24. Mánadagur* *Róm. 3.1-20*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**

Vit eru takksom, at Brian er komin fyri seg eftir skurðviðgerðina, og vit nú kunnu leggja ætlanir um at fara til Papua Nýguinea. Vit halda fram í tænastuni her í USA, meðan vit fyrireika fráferðina.



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8, Judah 6, Ethan 4**

## *25. Týsdagur* *Esaias 5.11-30*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg eri takksom fyri ferðina til Saudi Arabia um jólini at vitja eina vinkonu. Umsetingarráðgevin kemur vónandi aftur í feb. Tá skulu Lukasar og Jóhannesar evangeliið og Esters bók rættlesast. Vit fyrireika hetta. Ungi umsetarin hevur umsett Esters bók og eg hinar.

## *26. Mikudagur* *Róm. 3.21-31*



### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 12, Nana 10, Louie 8, Rio 2

Vit takka Gudi, at síðan í summar er sunnudagsskúlin vaksin úr fýra til átta børn, nú nøkur úr ensktflokkinum eisini koma. Hetta gevur tó avbjóðingar, tí stórur munur er á aldri og kunnleika um Bíbliuna. Biðið um vísdóm og signing.

### SENEGAL, Dakar
### Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 12

## *27. Hósdagur* *Sálm. 7*

### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Vit gleðast um, at Waraotoymið hevur fingið húsini upp og kann flyta aftur í ættina um stutta tíð. Einki toymi hevur verið har síðani 2006. Nøkur toymi hava vitjað ættarbólkarnar aftur í heyst. Meira bensin er eisini at fáa nú, og tríggir trúboðarar hava fingið endurnýggjað síni uppihaldsloyvi.



### DANMARK, Hirtshals, Malta
### Anna og Hans Djurhuus





**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Vit eru framvegis í bíðistøðu í Kanada, nú nýggja koronubylgjan ger um seg. Arbeiðið við Kankanaeysamkomuni heldur tó fram. 18. des. lótu 10 trúgvandi í bygdini seg doypa. Onkur teirra er úr sera religiøsari familju, sum ikki dámar, at sonurin varð doyptur.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Rebekka 16, Hanna 13**

★ Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 14 ár
★ Í dag fyllir Adonia Johannesen 14 ár

**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087

## 29. Leygardagur — Jóhs. 1.1-28



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 8**

Talið av fólki, ið søkja sær hjálp frá The Well International, veksur alsamt. Vit hava ikki møguleika at hjálpa øllum og biðja Harran um at senda fleiri fólk í hesa tænastu.

## 30. Sunnudagur — 2. Mós. 2.1-25

**OM, LOGOS HOPE, TEENStreet**

Miriam Olsen úr Klaksvík fer til Suðurafrika í tríggjar mánaðir at hjálpa við barnaarbeiðnum har. Noomi Eysturtún er komin heim eftir eitt ár umborð á Logos Hope. Hannah Berghamar er umborð á Logos Hope, sum er í Ghana. Biðið Harran leiða og varðveita tær tríggjar.

★ Í dag fyllir Petra í Prestgarði 8 ár

★ Í dag fyllir Tabita Christiansen 8 ár

**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**360 síður 249 kr.**

Timothy Keller viðger bíbilskar meginreglur fyri bøn og lýsir bønarlívið hjá persónum í Bíbliuni. Hann gevur okkum eisini praktiska vegleiðing um bøn við dømum frá egnum royndum. Verulig bøn er samrøða við Gud, har vit møta Gudi persónliga. Harumframt eggjar Keller okkum at søkja nærri samfelag við Harran, so vit kunnu uppliva veruleikan av nærveru hansara gjøgnum bønina.




Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos